# Fyrsta gullmerkið



*- Sjálvanedi vildi tað verið stuttligt, um vit kundu tryggjað okkum meistaraheitið í einum seinasta og avgerandi dysti, men hetta er nú heldur ikki so galið, helt HB-venjarin, tá vit eftir dystin hittu hann í sonevnda boot-rúminum í HB-húsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sum leikari hevur hann vunnið tað mesta av tí, sum kann vinnast, men fram til sunnudagin átti Jóannes Jakobsen framvegis fyrsta FM-gullið sum venjari til góðar**

MEISTARI
*Jákup Mørk*

Hóast hann nú hevur nøkur ár á baki sum venjari í bestu føroysku deildini, so er tað nú fyrstu ferð, at Jóannes Jakobsen hevur roynt at staðið sum venjari hjá føroyameistarum, og tí var løtan kanska eitt sindur serlig hjá honum sunnudagin.

- Tað er tó ikki heilt ókent hjá mær at vinna. Eg havi verið við til at vinna steypakappingina, og fleiri ferðir hava liðini hjá mær verið heilt nær við at gerast meistarar, men sjálvandi. Tað er nú stuttligari, tá tú stendur sum meistari, helt hann eftir dystin sunnudagin, tá vit fingu orðið á hann í sonevnda boot-room hjá HB.

- Men eg skal tó leggja afturat, at tað kanska kennist eitt sindur hálvt hjá mær, tí eg havi jú bara verið við hesar seinastu vikurnar. Skal eg vera eitt sindur egoistiskur, so haldi eg tó, at eg havi verið ein týdningarmikil partur í hesum, sigur hann við einum frekum smíli.

### Gummibein

Um dystin sjálvan helt Jóannes annars, at hesin var merktur av gullinum, sum meira ella minni stóð upp á spæl.

- Tað var heilt klárt, at leikararnir høvdu gummibein. Serliga í fyrra hálvleiki, har vit als ikki fingu ferð á spælið. Tað var annars júst ferðina, sum høvdu tosað um undan dystinum, men tað kom bara ikki, og tað er kanska nokk so náttúrligt.

- Annars haldi eg, at vit høvdu tak á alla tíðina, men eg má viðganga, at hjartað onkun tíð hoppaði nakrar ferðir eyka, og var óeydnan eftir okkum, so kundi tð enntá gingið heilt galið, tá Jan bjargaði á strikuni, men tíbetur gjørdist tað ikki so.

### Broytir einki

Tað er sjálvandi munur á, at HB nú fer til Tvøroyr sum meistarar, heldur enn at skula spæla fyri meistaraheitinum, men tað er kortini nakað, sum tú ikki fært venjarin at viðganga.

- Nei. Tað kann gera tað sama fyri okkum. Eg havi alla tíðina sagt, at Kári og eg gjørdu eina avtalu við leikararnar um, at vit skuldu royna at vinna seks teir seinastu dystirnar, og tað er fyrst og fremst hesa, sum vit halda fast um.

- Sjálvanedi vildi tað verið stuttligt, um vit kundu tryggjað okkum meistaraheitið í einum seinasta og avgerandi dysti, men hetta er nú heldur ikki so galið, tekur hann hugleiðandi til.

Tað kundi annars verið stuttligt hjá Jóannes, um hann saman við liðnum ognaði sær gulið á seinasta leikdegi júst á Tvøroyri. Í 1995 spældi HB seinasta dystin á Tvøroyri, og fram til seinasta minuttin vóru teir á odda, tá Henning Jarnskor við einum stútari í Klaksvík kortini syrgdi fyri, at gullið fór til Gøtu.

- Sjálvandi vildi tað verið nakað serligt, men hinvegin taptu vit ikki gullið á Tvøroyri ta ferðina. Tað vóru GÍ, sum vunnu tað í Klaksvík, men at tað verður munur á heimferðini ta ferðina og so nú komandi sunnudag, tað ivist eg ikki í, segði altso Jóannes Jakobsen at enda.








# Gylti skógvurin

**Toppskjúttin hjá HB í ár er Andrew av Fløtum, og tí mundi tað eisini vera hóskandi, at tað vað hann, sum fekk hol á, tá HB sunnudagin tryggjaði sær 16. meistaraheitið í søgu felagsins**

MEISTARI
*Jákup Mørk*

- Hevur John skorað í Gøtu?

Orðini koma við einum skeivum smíli frá higartil besta málskjúttanum í besta málskjúttanum í føroysku fyrstu deild, Andrew av Fløtum. Og tað er einki at siga til, at maðurin hevði sálarligt yvirskot til eisini at síggja tað stuttliga. Við fyrsta málinum í dystinum eydnaðist tað honum at lirka annars fastlæstu verjuna hjá EB/Streymi upp, soleiðis at HB endiliga kundi seta kósina móti meistaraheitinum.

### Visti at gullið var har

Jú, sanniliga var lagið gott á HB-leikarunum, nú teir loksins høvdu staðfest gullið, sum viðhaldsfólkini so spent hava bíðað eftir, og sum tey flestu eisini hildu vera staðfest, longu tá HB vann á NSÍ.

Tað skuldi tó ganga fimm korter, áðrenn HB fann vegin til meskarnar móti EB/Streymi, men tó at tað kanska var eitt hitt týdningarmesta málið hjá honum í ár, so dugdi Andrew ikki rættiliga at siga, hvat tað var, sum hendi, tá hol loksins kom á.

- Eg veit ikki ordiliga. Hatta var ein returur. Eg haldi tað var antin Rúni ella Rógvi sum skeyt, og tá málverjin ikki fekk hildið, so fylgdi eg upp. Vinkulin var kanska nokk so spískur, og skotið var kanska ikki so hart, men bólturin fór inn, og tað var tað týdningarmesta.

Tá málið varð skotið, var tað eisini so, at argastu kappingarneytarnir hjá HB, NSÍ og KÍ, bæði vóru aftan fyri í sínum dystum, og Andrew ásannaði eisini, at hann var greiður um hetta, tá hann skoraði.

- Jú. Vit fingu í steðginum at vita, hvussu støðan var í hinum dystunum, og tí vistu vit, at um vit bara vunnu, so skuldi tað nokk vera har, og nú er tað so eisini her, segði fegni toppskjúttin at enda.

Og John skoraði sum kunnugt ikki í Gøtu, so umframt meistaraheitið kann Andrew helst eisini fegnast um, at tað í ár verður hann, sum fær gylta skógvin sum toppskjútti í deildini.



*- Vinkulin var kanska nokk so spískur, og skotið var kanska ikki so hart, men bólturin fór inn, og tað var tað týdningarmesta, segði Andrew av Fløtum um gylta málið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fóru at tæna leikarunum

**Hóast einki var fyrireikað, so ivaðist HB-formaðurin ikki í, at talan skuldi gerast um eitt gott sunnukvøld fyri felagið**

MEISTARI
*Jákup Mørk*

Tað var sjálvandi ein ovurfegin HB-formaður, sum vit fingu orðið á, tá tað loksins varð staðfest, at HB er meistari í ár.

Eitt er, at felagskassin fær eina góða millión frá UEFA afturfyri, men formaðurin helt eisini, at meistaraheitið var so nåogv meira enn tað.

- Fyrst og fremst eru tað nú fýra ár síðani, at vit vunnu nakað, og fyri eitt felag sum HB er er hetta long tíð. So tað lyftir sjálvandi okkum øll, at vit nú endiliga hava fingið gullið.

- At tað hevur gingið longri tíð millum heitini seinnu árini er helst eisini ein avleiðing av, at fótbólturin í Føroyum er broyttur seinnu árini. Tað er ikki longur nóg mikið við eini sterkasti ungdómsdeild. Tú mást eisini styrkja um besta liðið, og tað hava vit so roynt at gjørt, og tað hevur so eisini hepnast.

### Ikki skeivt

Tá meistaraheitið er komið til høldar, er skjótt at staðfesta, at vinnarin hevur altíð rætt, og formaðurin í felagnum ásannaði eisini sunnudagin, at tað hava verið fleiri stórar avgerðir hjá nevndini í ár.

- Í nógvar mátar hevur árið verið eitt sindur turbolent hjá okkum, og tað hevur so avgjørt ikki altíð verið líka lætt, tá avgerðir skuldu takast. Nú skal eg ikki standa her og siga, at alt sum vit gjørdu var rætt, tí tað fáa vit nokk ongan tíð at vita. Men tað hevur tað so í øllum ikki verið heilt skeivt, og tað hevur í øllum førum týdning.

At enda spurdu vit eisini Birgir Enghamar, hvussu restina av kvøldinum skuldi haldast, nú gullið aftur var komið til HB, men tað visti formaðurin ikki reiðuliga.

- Nú hava vit so als ikki fyrireikað nakað sum helst, so tað dugi eg ikki at svara. Fyrst og fremst fara vit at spyrja leikararnar, hvat teir vilja, og so mugu vit bara tæna teimum, segði Birgir Enghamar.

Fyri tey forvitnu kann leggjast afturat, at tað var so hampuliga skjótt, at okkurt varð fingið í rættlag, og klokkan níggju sunnukvøldið lótu dyrnar í HB-húsinum upp til gullveitslu. Nær tær vórðu afturlatnar, er ilt at siga, men tað er lítið at ivast í, at nakrir tímar skulda ganga, áðrenn øll komu til hús, og ivaleyst hevur mánadagurin eisini verið strævin hjá mongum.

*- Nú skal eg ikki standa her og siga, at alt sum vit gjørdu var rætt, tí tað fáa vit nokk ongan tíð at vita. Men tað hevur tað so í øllum ikki verið heilt skeivt, sigur formaðurin í HB, nú meistaraheitið er komið til høldar*



# Heildin er styrkin

**Rúni Nolsøe var sjálvandi ovurfegin, nú meistaraheitið var heima, men hann var eisini væl vitandi um, at tað fyrst og fremst var hart arbeiði, sum lá aftan fyri hetta**

MEISTARI
*Jákup Mørk*

Sum liðskipari verður tað sjálvandi Rúni Nolsøe, sum á Sevmýru skal taka ímóti FM-steypinum, og sum liðskipari er helst eisini náttúrligt at fáa spurningin, hvat var tað, sum tryggjaði HB FM.

- Tað týdningarmesta haldi eg hevur verið, at heildin á liðnum hevur verið ótrúliga sterk. Vit hava havt bæði upp- og niðurtúrar, men vit hava megnað at rætta kósina, tá tað hevur verið neyðugt, og tað vitnar um eitt sera sterkt samanhald og høgan moral, helt liðskaparin, tá vit settu honum spurningin í skiftirúminum.

### Dekan ov tíðliga

Áðrenn hevur tað annars verið heilt nær við fleiri ferðir, og millum annað var talan bert um seundir, sum skiltu HB frá einum meistarheiti í fyrraárið. Hetta kundi kanska nervað fleiri leikarar, men liðskiparin helt tó, at júst hetta kanska hevði gjørt HB enn sterkari í ár.

- Hans á Lag plagar at siga, at mundi fær onga haru, og tað er yvir høvur hugburðurin, sum vit hava havt í ár. Ikki minst tí tað gekk so illa í fjør, hava allir leikararnir givið eitt lítið petti eyka, tí tað skuldi vera hesaferð. Tað vóru vit ikki í iva um.

Sum fleiri av viðleikarunum, so viðgekk Rúni eisini, at trýstið var stórt í dag, og hann viðgekk eisini, at hann fylgdi við í, hvussu gekst í hinum dystunum kring landið.

- Vit høvdu jú sera ilt við at fáa glið á spælið, og tað komst heilt víst av trýstinum. Vanliga hoyrir tú heldur ikki, hvat verður sagt í anlegginum, men í dag vóru oyruni nakað væl størri, enn tey plaga at vera, so eg visti alla tíðina, hvussu støðan var í hinum dystunum, viðgekk hann eftir dystin.

Og hann viðgekk eisini, at hann bíðaði til tað allar seinasta, áðrenn hann vildi taka meistaraheitið upp á tunguna.

- Rakettirnar vórðu sendar upp og øll sungu um meistaraheitið, men har vóru altso sjey minuttir eftir í Runavík, so eg vildi ikki siga nakað. Tað vildi eisini verið øgiligt, um alt krútið var uppi, og NSÍ so kortini hevði fingið vent dystinum, men tað gjørdu teir so tíbetur ikki, so nú er alt avklárað, segði fegni liðskiparin at enda.



*- Vanliga hoyrir tú heldur ikki, hvat verður sagt í anlegginum, men í dag vóru oyruni nakað væl størri, enn tey plaga at vera, segði HB-liðskiparin*

*Mynd: Álvur Haraldsebn*